LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 43/2018 eftir tingskipanini § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Edmundi Joensen, løgtingsmanni, um Sendistovu Føroya í Keypmannahavn og flytan av sendimanninum til Føroya**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Hvørjar umstøður og fortreytir eru broyttar, síðan sendimaður Føroya í Keypmannahavn er kallaður heim til Føroyar?

2. Verður sendimaður Føroya í Keypmannahavn í 2019 staðsettur í Føroyum at arbeiða við Fjareystri, ella verður hesin staðsettur í Keypmannahavn í 2019, soleiðis sum peningur vanliga er settur av til á árligu løgtingsfíggjarlógini?

Svar:

**Til 1.**
At vinna Føroyum betri marknaðarsømdir hevur verið ein høvuðsraðfesting hjá landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum, serliga í londunum Japan, Suðurkorea og Kina.

Sendimaðurin varð tí tikin heim í eina tíð fyri at styrkja um arbeiðsorkuna, ið verður brúkt uppá nevndu uppgávu. Harumframt hevur hann, í samstarvi við starvsfólkini á sendistovuni, havt ábyrgdina av at reka sendistovuna í Keypmannahavn.

Tað hevur verið eitt høgligt samanfall ímillum uppgávuna sum virkandi sendimaður í Keypmannahavn og ráðgevi í handilsmálum í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, tí nógv samskifti hevur verið við japanskar, kinesiskar og koreanskar myndugleikar, ið allir nýta sendistovur sínar í Keypmannahavn sum bindilið til føroyskar myndugleikar.

**Til 2.**
Miðað verður ímóti, at nýtt sendifólk til sendistovuna í Keypmannahavn verður tilnevnt seinna hálvár í 2019.

Í Tinganesi, 27. desember 2018

Aksel V. Johannesen
løgmaður

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo